Viðmerkingar:

Eigarafeløgini skulu vera við at mynda egna umhvørvi

Fyri rættiliga nógvum árum síðani fór býráðið undir ta skipan, at lata uppgávur til eigarafeløg í sambandi við nýggjar útstykkingar. Aðalendamálið var, at eigarafeløgini, og á tann hátt tey, sum har búgva, fingu møguleika at vera við at mynda útstykkingina frá fyrsta degi. Ein skipan, sum í mongum førum hevur roynst væl. Bæði tá útstykking og bygging er farin fram, og somuleiðis aftaná, við skipan og fríðkan av eitt nú fríøkjum. Aftur at hesum eru fleiri eigarafeløg sera virkin at skipa fyri bæði einum og øðrum.

Tey, sum mugu hugsast at hava størstan áhugan og kunnleikan at fjálga um sítt egna umhvørvi, eru tey, sum har búgva, umboðaði gjøgnum sítt eigarafelag. Tí er ikki annað enn rætt og rímuligt, at tey eigarafeløg, sum ynskja tað, fáa møguleika at átaka sær størri ábyrgd og skyldur enn tey hava í dag. Sjálvandi saman við eini hóskandi upphædd í mun til øktu uppgávurnar, og, um ynskist, við hollari vegleiðing frá býráðnum.

Á hendan hátt fær borgarin størri ávirkan og ábyrgd mótvegis sínum egna bústaðarøki, og kann hetta bert vera við til at skapa betri trivna fyri hin einstaka og grannalagið sum heild.

Tórfinn Smith,
býráðslimur
og valevni

Skattahækking hjá hesi samgongu

Ein av stóru samgonguflokkunum tosar nú um skattalætta. Nú er at vóna at hesin verður framdur í verki og ikki bert í orðum.Higartil hava vit bert sæð ein illvilja til annað enn at hækka skattirnar.

- Dømi 1: Avtøka av brennioljuavgjaldi er felt 2 ferðir í ár. Nýggja lóg, ið gav landskassanum meira í brennioljuavgjaldi hevur hendan samgongan samtykt.
- Dømi 2 : Tosa verður um at **hækka skattin** hjá sjómonnum, ið arbeiða nógv og hava stóra inntøku.

Niðurstøða:

- Ongantíð hevur landskassin fingið so nógv inn í skattum og avgjøldum sum nú.
- Ongantíð hevur landskassin havt so góð ráð at givið ein skattalætta.
- Og ongantíð er gjørt so lítið fyri at lækka skattin hjá borgaranum, sum undir hesi samgongu.

Hví ikki lætta um hjá føroyingum? Hví ikki royna at hava eitt so lágt skattatrýst sum møguligt. Ikki bert tosa um tað - men gera nakað ítøkiligt við tað. Tað fer vónandi ein meiriluti á Føroya Løgtingi at gera NÚ. Tí tað hava allir føroyingar sanniliga uppiborið.

Vinarliga

Marjus Dam,
løgtingsmaður

Lesið eisini Sosialin á Internetinum
www.sosialurin.fo

Blómandi matstovu- og cafévirksemi

Tað er hugaligt at kunna staðfesta, at matstovu- og cafévirksemið í høvuðsstaðnum hevur ment seg nógv seinastu árini.

Hetta hoyrir sjálvandi við til myndina av einum livandi, kveikjandi og skapandi býi - og er avgjørt við til at økja um trivnaðin bæði hjá borgarum og gestum.

Neyvan hava vit sæð síðsta skotið á hesi stammuni enn, tí so hvørt sum fólkatalið økist, økist eisini tørvurin og grundarlagið fyri fleiri tilboðum av hesum slagi.

Og skulu vit trúgva samstarvsfeløgum okkara í Aberdeen og Stavanger, so kunnu vit vænta eina rættuliga eksplosjón innan hesa vinnu- og tænastugrein næstu árini, verður olja funnin undir Føroyum. Soleiðis hevur gongdin verið í hesum báðum týdningarmestu oljubýunum á okkara breiddarstigum - og neyvan verður stórt øðrvísi her hjá okkum, tá „svarta gullið" væntandi um nøkur fá ár fer at spræna upp úr oljukeldunum sunnanfyri.

Til stuttleika kann verða nevnt, at áðrenn oljuvinnan av álvara tók dyk á seg í Stavanger, vóru bert fýra matstovur har við skeinkiloyvi. Í dag - sløk 30 ár seinni - eru tey meira enn 400 (!) í tali, spjadd út á alskyns matstovur, vertshús, spælistøð og caféir.

Samstundis er býurin - við sínum 110.000 íbúgvum - vorðin ein nýmótans og framkomin býur við einum rættuligum altjóða dámi.

Komandi býráð eigur sjálvandi at taka spurningin upp, hvussu kommunan á besta hátt kann skapa karmar fyri eini menning av hesi vinnugrein.

Við miðbýnum sum miðdepli.

Miðbýurin eigur at verða tann hugnaligi felagsstaðurin, soleiðis sum sligið verður fast í frálíka mentanarálitinum, ið varð latið úr hondum í fjør.

At styrkja miðbýin sum mentanarligan miðdepil er at geva øllum býnum lív, sum tikið verður til í álitinum.

Og her hevur matstovu- og cafévirksemið - saman við spælistøðum - ein sjálvsagdan leiklut nú og í framtíðini.

Vinarliga

Leivur Hansen,
borgarstjóri

Nýggj Perla og Tórsgøta



Komandi Býráð hevur eftir mínum tykki eina **moralska skyldu** at fáa ílag eitt **tónleikahús**, eina nýggja **Perlu.** Tað er nógv ungfólk ídag í Havn sum fáast við tónleik. Hesi venja í kjallarum og garagum men hava sjáldan høvi at spæla alment og sýna síni kynstur. Slíkt er spell og kan tað darva spælihuginum.

Gamla Vaskaríið í Tórsgøtu kundu verið ein byrjan til eitt tónleikahús við einum tónleikaumhvørvi har fólk kundi hugnað sær og ungir tónleikarar hava síni fyrsu framførslur.

Tað eru nógvir møguleikar í Tórsgøtu. **Rio Bravo, Casablanca, Meiaríið, Pizzacafé** eru longu har.

Fáa vit so **Vaskaríið til tónleikahús** fer enn meira lív og virksemi koma í hesa gøtu og í **Vágsbotni.**

Müllers Pakkhús eigur at verða ein **fiskamatstova.**

Johan Mortensen
valevni til býráðsvalið
fyri Tjóðveldisflokkin

Vallyftini og fíggjarpolitikkurin hjá nýggja býráðnum!

Tað nývaldað býráðið kemur at fáa tað nógv truplari enn núverðandi býráð hevði tað tá tað tók við, tí tað longu nú eru givin so nógv vallyftir. Búskaparviðurskiftini í Føroyum vóru ógvuliga vanalig í byrjanini av nýtiárunum og tí var ikki møguligt at lova so nógv tá, men nú er støðan øðrvísi.

Orsakað av tí framgongd, sum vit hava í samfelagnum í dag lova fleiri av valevnunum so nógv at fíggjarlógin hjá Tórshavnar býráð verður sprongd fleiri ferðir. Tað fer at krevja stórt dirvi av teimum komandi býráðspolittikarunum at tora at siga nei til fleiri av teimum vitleysu vallyftunum, sum nú verða givin. Ein spurning, sum vit altíð mugu seta okkum er, hvar skal peningurin koma frá? Ella frá hvørjum øki skulu vit taka pening til eitt annað øki?

Tað verður neyðugt at gera eina raðfesting av teimum ymisku málunum við í minstalagi einari ætlan yvir fýra ár og helst longri. Hóast nógv er goldið niður av skuldini hjá Tórshavnar Kommunu so er skuldin framvegis stór og verður neyð1ugt at fáa skuldina niðurgoldna.

Schumann Hjaltalin,
býráðslimur
Valevni fyri
Sambandsflokkin

Vallyfti og píkar

Í hesum døgum er ikki eiti á lyftum um bæði líkt og ólíkt, og ikki er eiti á nógv sum nú, alt í einum vita mest sum alt, hvat vit mangla og ikki mangla, Gud viti um øll hesi hugsa hvat tey siga ella lova, og tí kundi tað veri ahugavert at vita um nakar av øllum hesum vitandi fólkunum sum stilla upp, tora at taka upp eitt evni sum PÍKAR.

Í dag eru tey flestu greið yvir at vit fara inn í eitt hálvár, har Havnin, tann sokallaða reina Havn, aftur skal líkjast einum runudíki.

Tað næsta hálva árið, skullu øll tey, ið sjúk eru av astma, lungasjúk av ymiskum slag,og øll tey ið eru sjúk í hals/nøs oghava allergi at finna seg í, at nøkur fá sum brúka píkar, gera teimun dagin ótolandi.

Nú skuldi tíðin verið inni, at tey,sum slíta vegirnar og gera Havnina til heimsins skitnasta bý, eisini skulu gjalda fyri tað. Her er vert at minna á,at í Norra verður goldi 320 kr um mánaðin og 25 kr um dagin, um tú fer inn í býin at koyra.

Spennandi hevði verði um onkur av øllum hesum vælvitandi vælevnum,hevði tora at tikið hesa størstu umhvørvisdálking í álvara. Her eru nógvar stemmur at heinta til tann ið torir.

Tað er langt síðan, at vegirnir hava verið í so ringum standi. Um Havnin skuldi asfaltera alt,ið treingir til í dag, fyri at vegirnir skulla vera tryggir at koyra á,hevði hetta kosta um 15 milliónir.

Tað er løgið, at eingin politikkari tekur sær um reiggj,og fær steðga hesum oysli av 50 milliónum sum kunnu sparast fyri alt landið?

Vinarliga

Petur Hermansen

Viðmerking:

Grønt er gott fyri eygað

Havnin er aftur í vøkstri. Nýggir bygningar verða reistir og nýggir vegir gjørdir. Meira asfalt, meira betong. Tá eiga vit at steðga á og spyrja: Hava vit tikið neyðug fyrilit til náttúru og umhvørvi?

Rætt man vera at taka í egnan barm fyrst. Sitandi býráð er faðir at Tórsvølli. Sum eitt skrímsl er hann á at líta. Kanska ikki úr erva, men í øllum førum úr neðra. Fyrigevið okkum borgarar! Øllum átti tó at staðið greitt, at Gundadalur fór ikki at verða tann sami, tann dag hetta bygningsverk tók sæti í dalinum. Men fáur man hava ímyndað sær, at úrslitið gjørdist so grefligt. Um tað hevði verið stórt øðrvísi, um onnur tekning hevði ligið á borðinum, er tó ilt at siga.

Lukkutíð er síðsta orðið ikki sagt. Risin má og skal hampast, og kanska meira enn tað. Fyri tað fyrsta er "verkið" ikki meir enn hálvgjørt, og fer liðugtgerðin óivað at bøta um støðuna. Tó eigur álvarsliga at verða umhugsað, um ikki størri tøk mugu takast. T.d. við at lækka niðara enda.

Eg haldi annars, at býráðið í hesi setu hevur givið umhvørvinum gætur. Vit hava t.d. fingið tvær snøggar rundkoyringar, onnur á Hálsi, hin við SMS. Tær hava hepnast væl, ikki bara ferðslutøkniliga, men eisini til útsjóndar. Eftir mínum tykki er økið fram við SMS samstundis fríðkað munandi.

Eg kundi hugsað mær at nevnt eitt annað dømi um hepna hond í sambandi við vegagerð. Vakra grótlaðingin fram við nýggja Marknagilsvegin áraka Svalbarðsvegin. Yvirhøvur er Ringvegurin á góðari leið. Tá ið teir síðstu tilkoyringarvegirnir eru komnir uppá plass komandi ár, fer samstundis at verða hampað um á síðsta parti av ringvegakervinum, m.a. eisini strekkið millum Landavegin og Velbastaðvegin.

Miðbýurin fær í løtuni eina andlitslyfting. Farið var til verka í ár, og hildið verður fram komandi ár. Bilurin verður ikki bannaður, men vónandi fæst eitt meira gonguvinarligt umhvørvi fram við Tinghúsvøllin, har fólk fáa hug at steðga á og kanska hvíla seg.

Fleiri gongustíggjar eru gjørdir og hampað er um aðrar. T.d. við Svartafoss og av Hamrinum og oman. Men ikki minst gøtan frá Oyggjarvegnum og út á Norðasta Horn er ein perla. Ítøkiligar ætlanir er um fleiri gongustíggjar og grøn øki, t.d. á Argjum við Spinnaríið og við gamla vatnbrunnin í Svanga. Eitt kort, ið sýnir allar gøturnar og økini, átti at verið tøkt.

Rætt skal vera rætt. Dømi eru eisini um grøn øki, ið forfarast. M.a. spælipláss, ið ikki verða hildin við líka. Kommunan kann ikki renna undan sínari ábyrgd. Men tað er týdningarmikið, at nærumhvørvið luttekur, og at m.a. eigarafeløgini eru til reiðar at átaka sær meðábyrgd við m.a. at ansa eftir og hampa um.

Ofta eru tað smálutirnir, ið gera munin. Fara vit óstortsliga fram, gerst úrslitið hareftir. Hugsa vit okkum um, ber kanska til at skapa okkurt, ið er øllum til gleði. Vit eiga tí at vera á varðhaldi, nú býurin aftur hevur fingið vakstrarverkir.

Klæmint Olsen
býráðslimur

Árnfjarðar nevnd

Staðbundin nevnd skal nú veljast fyri bygdina Árnafjørð

Eftir áheitan frá borgarum í Árnafirði, sum er partur av Klaksvíkar kommunu, hevur býráðið samtykt, at seta á stovn staðbundna nevnd fyri bygdina.

Uppgávan hjá staðbundnu nevndini er at vegleiða, umrøða og gera tilmæli til býráðið í málum, sum hava við spurningar í Árnafirði at gera og soleiðis taka sær av áhugamálum í bygdini.

Býráðið samtykti – áðrenn samtyktin varð sett í verk – at senda borgarunum í Árnafirði skriv við fyrispurningi um teirra áskoðan á eina møguliga nevnd fyri bygdina.

Henda kanning vísti, at stórur meiriluti av borgarunum í bygdini tekur undir við ætlanini, og fyrireikar Valnevndin fyri býráðsval í Klaksvík nú hetta valið, ið verður samstundis sum býráðsvalið.



KROSSORÐAGÁTA

Vinnari: Súsanna Niclasen
á Hamarsbrekku
850 Hvalba

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: FULLRIGGARI



Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í *seinasta lagi hósdagin*. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. …«** á bjálvan.

247

Loysunarorðið: .....

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: .....

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:

- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Kalr N. Hansen týddi*

Frá FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:

- ❑ **Grønur var dalurin** - *Richard Llewellyn/ Knút Olsen týddi*
- ❑ **Tit bygdu hetta land - Arbeiðsmarknaðurin** - *Jákup Pauli Strøm*
- ❑ **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- ❑ **Frumsagnir** - *Neil Philip/Amy Tausen týddi*
- ❑ **Mállæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt